# Kunngerðablaðið A

2012 Hefti 2

ISSN 0907-905X


Nr. 3 19. januar 2012

## Kunngerð
## um
## veðskuldarlán frá Húsalánsgrunninum til íbúðafeløg og íbúðastovnar

Við heimild í § 5 a, stk. 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010, sum broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 6. oktober 2011 verður ásett:

**§ 1.** Húsalánsgrunnurin kann veita veðskuldarlán til:
1) keyp av grundstykki,
2) keyp av bygningi,
3) nýbygging og
4) umvæling.

**§ 2.** Umsóknin skal vera skrivlig og við umsóknini skulu fylgja:
1) tekningar,
2) kostnaðarætlan,
3) tilfar at meta um verkætlanina,
4) viðtøkur og fíggjarætlan og
5) onnur skjøl, sum grunnurin heldur vera neyðug.

*Stk. 2.* Umsøkjarin ber kostnaðin fyri meting og aðrar útreiðslur í sambandi við lánsveiting.

**§ 3.** Íbúðafeløg og íbúðastovnar, sum fáa lán úr Húsalánsgrunninum, skulu hava viðtøkur, sum eru góðkendar av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin.

*Stk. 2.* Viðtøkurnar skulu m.a. áseta, hvørt talan er um eigara-, luta- ella leiguíbúðir ella um talan er um eina samanseting av hesum, skal býti vera greitt.

*Stk. 3.* Viðtøkurnar skulu m.a. fevna um:
1) reglugerð fyri roknskap,
2) ársaðalfund,
3) grannskoðan,
4) nevnd ella stýrið og
5) hvussu verður við ognunum hjá felagnum og ella stovninum um virksemið steðgar ella felagið og ella stovnurin verður tikin av.

**§ 4.** Húsalánsgrunnurin kann seta byggitøknilig krøv til byggjarí, krøv til orkunýtslu, stødd, dygd o.a.

**§ 5.** Húsalánsgrunnurin tekur avgerð um lániumsóknina við støði í eini meting um afturgjaldsevni og eftir einari heildarmeting.

**§ 6.** Stýrið fyri Húsalánsgrunnin ásetir mestu upphædd á lánum, sum grunnurin veitir.

**§ 7.** Stýrið fyri Húsalánsgrunnin ásetir útlánsrentuna og kostnaðin fyri lán hjá grunninum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal góðkenna rentuásetingina.

**§ 8.** Afturgjaldstíðin fyri lánini kann vera upp í 30 ár.

*Stk. 2.* Renta verður roknað 4 ferðir árliga. Lánsgjøldini falla til gjaldingar mánaðarliga ella eftir avtalu.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 19. januar 2012

**Jørgen Niclasen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo (sign.)

Nr. 4 20. januar 2012

**Kunngerð**
**um**
**avhending av skyldueintøkum til Landsbókasavnið í Søvnum Landsins**

Við heimild í § 31 og § 32, stk. 1-3 í løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn verður ásett:

**§ 1.** Skyldueintøk verða, sambært §§ 24 og 26 í lógini, avhend Føroya landsbókasavni.
*Stk. 2.* Avhendingin fer fram so hvørt ella við fyrstkomandi mánaðarbyrjan januar, mars, mai, juli, september, november eftir framleiðslu.
*Stk. 3.* Føroya landsbókasavn kann gera frávik frá stk. 1 og 2 og áseta aðrar tíðarfreistir.
*Stk. 4.* Gevst tann, ið skal avhenda tilfar, við virksemi sínum, skal skylduavhendingin latast inn alt fyri eitt.

**§ 2.** Føroya landsbókasavn varðveitir í minsta lagi eitt av sínum eintøkum á tryggum staði. Landsbókasavnið ger sjálvt av, hvussu hini eintøkini verða nýtt.

**§ 3.** Skyldueintøkini skulu vera soleiðis frágingin og merkt, at tað eyðsýniliga verður upplýst, hvat talan er um, og hvør avhendarin er.
*Stk. 2.* Skyldueintøkini skulu latast Føroya landsbókasavni fullfíggjað og óskalað. Húsar, kápur o.a., ið hoyrir til útgávuna, skulu fylgja við.
*Stk. 3.* Við avhendingini skal fylgja eitt fullfíggjað yvirlit í tveimum eintøkum, har upplýst verður, hvørji skyldueintøk verða avhend, í hvussu nógvum eintøkum og nær. Er talan um smáprent, sum t.d. faldarar og líknandi, er bert neyðugt at upplýsa tal. Yvirlitið skal síðani innihalda váttan um, at alt, ið eftir lógini og kunngerðini skal avhendast, er tikið við. Váttanin skal verða undirskrivað av tí, ið avhent hevur, ella øðrum í hansara stað.
*Stk. 4.* Er talan um útgávur, ið eru tøkar á netinum, skulu hesar fráboðast Føroya landsbókasavni so hvørt. Landsbókasavnið ger av, hvussu avhendingin í slíkum førum fer fram.

**§ 4.** Tá ið skyldueintøkini eru móttikin og gjøgnumgingin, sendir Føroya landsbókasavn tí, ið avhent hevur, kvittan fyri móttøkuna. Vantar eitthvørt, sendir landsbókasavnið áheitan um at fáa tað, ið vantar, sendandi.
*Stk. 2.* Verða avhendingarskyldug eintøk ikki útvegað landsbókasavninum, kunnu hesi verða keypt fyri rokning hjá tí, sum hevur avhendingarskylduna.
*Stk. 3.* Framleiðslu- og flutningskostnaðin av avhendingarskyldugum eintøkum ber útgevarin, sbr. § 29 í løgtingslóg um bókasøvn.

**§ 5.** Tilfar, ið kemur undir avhendingarskyldu, er ásett í fylgiskjali nr. 1.

**§ 6.** Í teimum førum har landsbókasavnið metir, at tað hvørki hevur mentanarligan ella granskingarligan týdning, at prentluturin o.a. verður goymdur, kunnu avhendu eintøkini verða beind burtur.
*Stk. 2.* Tilfar, ið ikki kemur undir avhendingarskyldu, er ásett í fylgiskjali nr. 1.
*Stk. 3.* Tilfar, ið er framleitt í Føroyum fyri útlendskan útgevara og við útlendskum marknaði fyri eyga, er ikki avhendingarskyldugt.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 20. januar 2012

**Bjørn Kalsø (sign.)**
landsstýrismaður

/ Leivur Harryson (sign.)

Fylgiskjal 1

**Avhendingarskylda**

| **Prentað tilfar:** | | | |
|---|---|---|---|
| Avísir,<br>árbøkur,<br>bløð,<br>bóklingar,<br>bøkur,<br>faldarar,<br>ferðaætlanir, | flogseðlar,<br>framleiðslulýsingar<br>framskorin kort,<br>frágreiðingar,<br>kort,<br>leikskráir,<br>lýsingar,<br>myndir, | nótar,<br>plakatir,<br>postkort,<br>príslistar,<br>roknskapir,<br>skráir,<br>sølutilfar,<br>tíðarrit, | o.a. líknandi tilfar, sum landsbókasavnið metir um. |
| **Mikroformútgávur:**<br>Mikrofiche og<br>mikrofilmar. | **Fotografiskar útgávur:**<br>Dias,<br>pappírsmyndir og<br>punktskriftútgávur. | **Ljóðupptøkur:**<br>Fløgur,<br>ljóðbond og<br>plátur. | **Sjónbond:**<br>Filmbond,<br>sjónbanda-diskar,<br>sjónbond og<br>spælifilmar. |

| **Samansettar útgávur:**<br>Samansetingar av tveimum ella fleiri av omanfyri nevndu sløgum av útgávum. |
|---|
| **Talgildar útgávur:**<br>Disklar, fløgur og útgávur, ið bert eru tøkar á netinum. |
| **Tilfar, sum ikki kemur undir avhendingarskyldu:** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Atgongumerki,<br>brævbjálvar,<br>brævpappír,<br>edv-skráir,<br>innbjóðingar,<br>kortspæl,<br>lutaseðlar,<br>merkiseðlar,<br>oyðubløð,<br>pakkitilfar, | peningaseðlar,<br>serprent,<br>skrivipappír,<br>spæliplátur,<br>steinprent og onnur<br>eittblaðslistaverk,<br>virðisbrøv,<br>visittkort, | lokalar ellar aðrar ser-<br>útgávur av tíðarritum<br>og bløðum, ið hava<br>sama tilfar, sum er í<br>einum høvuðsblaði,<br>o.a. líknandi tilfar, sum<br>landsbókasavnið metir<br>um. | |

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at leggja kærumyndugleikan eftir ymsum løgtingslógum til Vinnukærunevndina**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 79 frá 28. august 2008 um at leggja kærumyndugleikan eftir ymsum løgtingslógum til Vinnukærunevndina, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í innganginum verður „§ 11 í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008“ strikað, og í staðin verður sett: „§ 24 í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m.“.

2) Í § 4 verður „Landsverk“ broytt til: „Heilsufrøðiliga Starvsstovan“.

**§ 2**

Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 23. januar 2012

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705